# Stýrisfundarbók FKF

## 13-09-2011 / 10

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10:00

*Fundur lokin kl:* 12:00

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Herálvur Jacobsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | Avboð |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 40**

FKF Jour. nr: 09-148

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Drekkivatn, kunngerðaruppskot

Málslýsing: At taka upp frá seinasta fundi. Sí skjøl 40 1 og 40 2.

Samanumtikið:
Kunngerðaruppskotið er næstan orðrætt týtt úr norsku forskriftunum um drekkivatn. Góðskurøvini eru hægri enn í EU direktivinum, sum annars er galdandi her, viðv. fiskaútflutningi. Sama er galdandi viðv. eftirlitinum og tali /títtleika av sýnum.

Kravið um, at søkjast skal um løggilding av verandi vatnverkum innan 1 ár frá tí at kunngerðin er lýst, er alt ov stutt. Til dømis, hava EU lond havt 5-15 ár.

Onkur av góðskukrøvunum til drekkivatn kunnu ikki loysast, t.d. liturin á vatninum.

Saman við løggildingini, er talan um økta útreiðslu fyri kommunurnar.

Fundarsamtykt: Brúka notatið í svarskrivinum, og leggja dent á
- endurgjaldskravið,
- tíðarsetningurin løggilding.

*Støða: Svarskriv merkt 09-148_3.1, sent VMR 15. septembur.*

**Fundarmál nr: 41**

FKF Jour. nr: 09-143

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Elorkuøkið - heildarætlan

Málslýsing: At taka upp frá seinasta fundi.

Fundarsamtykt: Tað verður ikki góðtikið, at landið ognartekur SEV.

Um ognarviðurskiftini skulu broytast, má landið í samráðingar við kommunurnar sum eru eigararnir, og ikki SEV.

Heita á KSF at taka málið upp í felag.

*Støða: Í bíðistøðu.*

**Fundarmál nr: 44**

FKF Jour. nr: 09-150

Reist av: Formanninum

Fundarmál: Fíggjarætlan 2012

Málslýsing: 1. uppskot til fíggjarætlan FKF fyri 2012 til viðgerðar. Sí skjal 44.

Fundarsamtykt: At taka upp aftur tá upplýsingar um limagjaldið er komið.

*Støða: Í bíðistøðu.*

**Fundarmál nr: 45**

FKF Jour. nr: 09-151

Reist av: Skrivaranum

Fundarmál: 44. umboðsráðsfundur FKF

Málslýsing: Fyrireiking til komandi umboðsráðsfund.

Tema
Tíðspunkt
Stað

Fundarsamtykt: Tema: Alternativ orka, kommunan og orka, Vestmanna, Sørvágur, orkusparingar (byggireglugerðin). Idiella kommunan. Tíðspunkt: 24-25 feb, kanna dagsetningin fyri øðrum aktivitetum. Stað: Hafnia.

*Støða: Í gongd.*